# Hópdeyði í Fámjin



250.000 smolt doyðu á Guttanstøð í Fámjin í summar Mynd: Edvard Joensen

*Óhapp við vatnveitingini hjá smoltstøðini Guttanstøð í Fámjin kostaði 250.000 smoltum lívið í summar*

EDVARD JOENSEN

**Fámjin:** Ein kvart millión smolt doyðu, tá ein rist í vatnveitingini til smoltstøðina typtist í summar. Fiskurin var tryggjaður.

Hann var landnyrðingur í ættini, tá alarmurin fór í gongd um sjeytíðina hendan morgunin, greiðir Edvard Magnussen, leiðari á smoltstøðini Guttanstøð í Fámjin, frá. Og landnyrðingurin ger, at móra flytir seg eftir botni á Kirkjuvatni, haðani Guttanstøð fær vatn til alikørini. Rist er fyri vatninntakinum, og tað var hendan, sum typtist hendan morgunin.

Summarið hevur verið turt, eisini í Fámjin. Men ikki turrari enn so, at tað onkuntíð hevur verið líka lítið vatn í Kirkjuvatni, sum tað var í summar, sigur Edvard Magnussen. Tað vóru so fleiri óheppin samanfall, sum gjørdu, at fiskurin doyði.

Beinanveg, ávarðingin var farin í gongd, varð boð sent eftir arbeiðsfólkinum, sum gjørdi so skjótt av, sum til bar. Men kortini doyðu 250.000 fiskar, tí luft var komin í rørini.

Edvard Magnussen sigur, at hetta var serliga óheppið, og at tað var óvanligt, at ristin skuldi typpast so skjótt. Hon var reinsað bara tveir dagar frammanundan.

Tað er stórarbeiði at taka upp aftur eftir slíkt felli, sigur Edvard Magnussen. Ikki alt doyði hjá teimum, men stórir partar úr fleiri kørum. Og tað stóra arbeiðið lá í at fáa lúka burturúr. Livandi og deytt hvørt fyri seg.

Fiskurin var tryggjaður, so nakað fekst aftur tann vegin. Men ikki meira enn reiðiliga helvtin av talinum kortini. 130.000 smolt vórðu flutt norðaneftir til Fámjins. So missurin verður altíð eitt sindur. Bæði í tíð og fiski.

Edvard Magnussen sigur, at teir høvdu ætlanir at byggja út, soleiðis sum tær flestu smoltstøðirnar gera í løtuni. Skifta smá kør út við størri og gera eina høll at hava fiskin inni í. Hetta er nú seinkað nakað, og ikki er til at siga, nær hetta kann fara at verða gjørt.

Hóast ætlaða útbyggingin er flutt eitt sindur fram í tíðina, gjørdi óhappið kortini ikki, at støðin ikki fer at hóra undan, sigur Edvard Magnussen.

Annars letur hann at, at tað er heldur trongligt, har smoltstøðin liggur, so møguleikarnir fyri útbygging eru ikki teir heilt optimalu kortini.

Smoltstøðin Guttanstøð hevur 850.000 smolt gangandi. Tey verða øll latin til alistøðina Hellisvað í Árnafirði. Flutningurin norður um Fjørðin er bæði langur og strævin, sigur Edvard Magnussen.

Fyrst verður fiskurin koyrdur í kør í Fámjin og fluttur við bili til Tvøroyrar. Haðani í brunnbát, sum siglir hann norður til Árnafjarðar, har hann verður settur í aliringarnar. Deyðiligheitin er helst í hægra lagi. Um minni enn tíggju prosent doyggja undir flutningi, halda teir ikki illa standa til. Tó er tað sera ójavnt, sigur Edvard Magnussen og leggur aftrat, at venjingin við tíðini er vorðin so mikið góð, at tað er farið at batna munandi.

Guttanstøð fær eygarogn frá Fiskaaling við Air at klekja. Tað eru bara Fiskaling og Fútaklettur í Vágum, sum hava loyvi at ala lívfisk.

Guttanstøð er einasta arbeiðsplássið í Fámjin. Har arbeiða trý fólk fast. Men tá okkurt stórvegis er at gera, plaga eini tvey-trý aftrat at verða biðin til arbeiðis.

Edvard Magnussen sigur, at støðin hevur15 ár á baki og rindar árliga einar 800.000,- til eina millión krónur í lønum.

Og tað eigur at merkjast hjá eini lítlari komunu sum Fámjins Kommunu.

# Játtanin uppbrúkt

*Tá asfalteringin, sum nú verður gjørd undir Valaknúkum, er liðug, verður ikki meira vegarbeiði har á leiðini í ár*



Vegastubbin Undir Gøtueiði er kommunalur og verður ikki bundin í landsvegin um Gøtueiði

Mynd: Edvard Joensen

EDVARD JOENSEN

**Gøtueiði:** Vegagerðin á eystara armi á Skálafjørðinum er við at steðga upp fyri í ár. Játtanin er brúkt, tá asfalteringin undir Valaknúkum er liðug.

Vegastrekkið úr Skálafirði og út um Valaknúkar skal nú asfalterast. Byrjað verður, fyrsta líkindi verða, og so eru ikki fleiri pengar eftir til vegagerð har á leiðini í ár, verður sagt av vegdeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

Vegurin út eftir eystara armi á Skálafjørðinum er heldur smalur millum Skálafjørð og Skipanes. Okkurt er gjørt, men enn er ymiskt, sum stendur á ynskilistanum hjá vegdeildini. Eitt nú strekkið innan fyri Tjørnunes, sum kann vera beinleiðis vandamikið at koyra á. Sýnið er so sum so, og eingin verja er.

Annað er vegastrekkið um Gøtueiði. Har vóna teir á vegdeildini at sleppa at gera liðugt komandi ár. Treytað av, at játtan fæst.

Nógv tilfar er fingið úr spreingingini, sum hevur ført vegin tvørtur um Eiðið. Ætlanin er at fara oman á »Vendiplássið«, sum tað fyrr varð nevnt ,og har bynda í vegin milum Søldarfjørð og Skipanes.

Sum er, er eingin játtan, so har verður iki arbeitt meira í ár. Men vónandi og væntandi verður nýggja játtanin so mikil, at arbeiðið kann gerast liðugt komandi ár, verður sagt av vegdeildini.

Annars eru tað nógv, sum hava sett álit á, at vegstubbin, sum fer niðan um bygdina Undir Gøtueiði innaneftir, fer at verða festur í vegin um sjálvt Gøtueiði.

Men hetta er ikki landsvegur, siga tey á vegdeildini hjá Landsverkfrøðinginum. Talan er um kommunalan veg, eins og tær maskinur og bilar, sum har standa, eru ogn hjá privatum entreprenørum.

Hinumegin fjørðin verður farið undir onkrar smávegis umvælingar á Strandavegnum. Har verður bara tað ringasta tikið soleiðis, verður sagt av vegdeildini hjá Landsverkfrøðinginum.

Sum skilst er ein samla verkætlan fyri Strandavegin gjørd. Talan er um at leggja vegin frá ítróttarhøllini á Skála og út á Strendur oman fyri bygdirnar út eftir. Men har eru- sum so mangastaðni - ikki pengar tøkir.

Og inni í Skálafirði er eisini eitt strekki frá íbindingini við Statoilstøðina og út um bygdina vestanfyri, sum ynskiligt hevði verið at fingið breiðka ella flutt.




'2000

VØRUMESSAN

í Ítróttarhøllini á Hálsi

8.-10. september




Vælkomin

á Vørumessuna 2000

Sosialurin - 311820